## VIÐMERKINGAR

# Lágt ríður tú

**Mannbjørn Tausen**
*Ein stoltur Vágbingur, men eisini Suðringur*

Enn einaferð mugu vit ásanna, at Landstýrið og samgongan unna okkum ikki tað svarta undir neglunum. Enn einferð síggja og hoyra vit, at landstýrismaður, sum er haðani úr bygdini, niðurger okkum. "Vágbingar vilja bara hava uttan at lata okkurt afturfyri". Álvaratos , harra Hans Pauli Strøm, hvat billar tú tær inn?. Há og spott hava vit fingið nokk av her suðuri. Hvør hevur nikkað og góðtikið burturflytingar meiri enn vágbingar? Hvør hevur verið meira tolin enn vit? Nei , Hans Pauli, millum tykkum eiga vit ongan góðan. Tú tosar um, at ein skúli í Hovi (ikki í Vági!) er skúli fyri alla oynna!. Er Suðuroyar sjúkrahús ikki eisini sjúkrahús vágbinga???. Hví hevði tú ikki orðið, tá málið - flyta skúlan úr Hovi til Vágs - var fyri í Løgtinginum 3 - 23 og 27. mars 2001. Sera fá høvdu orðið. Ein atkvøddi ímóti undir 2. viðgerð (J. av Rana), men øll atkvøddi fyri undir 3. og endaligu viðgerðini (28 á fundi). Um Fiskivinniskúlin í Vestmanna skal flytast, hvat gert tú tá? Kanska sum strutsurin? Í tykkara ómegd hava tit klára at sátt split millum vinir og kenningar, sett bygdir upp ímóti hvørjum øðrum, ja, ein heil oyggj fundast og keklast um tykkara neyðaregg. Hvat er hetta fyri eitt "tilboð"? Um vágbingar ikki krúpa, so fáa SUÐUROYINGAR onki røktarheim!!! Broytingaruppskotið á býráðsfundinum snúði seg annars um at tosa við Landstýrið um eitt røktarheim í Suðuroy - ikki í Vági, men í Suðuroynni (har eisini Vágur liggur!!!!). Nú gert TÚ okkum til syndabukkar!! Lágt ríður tú, fyrrverandi bygdarmaður mín.

Eg og sera, sera nógv við mær eru hørm, ill og skuffaði yvir tað viðferð, vit hava fingið frá okkara grannum. Men skálkarnir aftanfyri, tað eru okkara fólkavaldu, teir, ið hava staðið á trappusteinunum og á gøtuhornunum og sagt seg hava loysnirnar - pragmatiskar loysnir - er loysnin í Vági pragmatisk?.

Verður gerandisdagurin nógv betri hjá sandvíkingum og hvalbingum, um skúlin verður fluttur?

Øll mugu skilja, at hetta "tilboð" nívir okkum sera fast, tá vit - ikki til stuttleikar, men sum eitt neyðarróp, ganga kravgongu. Mannsterk fara hampafólk gjøgnum bygdina inn á býráðsskrivstovuna og standa har hóttandi við skeltum uppi yvir okkara fólkavaldu, sum eru hampafólk og okkara vinfólk. So langt eru vit farin, tí vit ikki bakka og krúpa longur. Vit *vilja ikki* av við skúlan, stutt og greitt, tí hann er her.

Eg heiti so inniliga á suðringar at arbeiða saman um eina felags framtíð. Stuðlið okkum við Miðnámsskúlanum - ongin fer illa av at koyra 6 - 7 min eftir breiðum og góðum vegi líka til okkara vakra Vatn og Hamrabø. Vit stuðla Heilsuskúlanum á Tvøroyri. Saman arbeiða vit víðari við loysnum á eldraøkinum allari oynni at gagni. Eisini eru fleiri aktørar komnir á vøllin við góðum hugskotum á vinnuliga økinum, tí berandi økinum. Latið okkum lofta møguleikunum og seta skøtil á framtíð okkara.

Hvat so við Landsstýrinum? Jú, tað er ein góður spurningur.

# Hvat hendir í veruleikanum um danir sleppa ES-fyrivarnunum?

**Kjakið um hvørja ávirkan tað fer at hava á Føroyar, um danir velja at ganga frá sínum fýra fyrivarnum í teirra limaskapi í ES, er í løtuni bygt meira á misskiljingar og villleiðingar enn á fakta. Tí er neyðugt at sláa fast, hvat er sannleiki og hvat er søgn í hesum máli.**



VAL05

**Kaj Leo Johannesen**
*Sambandsflokkurin*

Danska uttanríkisráðið hevur í fleiri umførum greitt frá hvørjar avleiðingar ein møgulig víðkan av danska ES limaskapinum fer at hava fyri Føroyar og ríkisfelagsskapin. Her er staðfest at:

- Stjórnarskipanarsáttmálin millum londini í ES, sum helst kemur til atkvøðugreiðslu í Danmark innan stutta tíð, er ikki galdandi fyri Føroyar og Grønland
- Føroyar eru uttan fyri ES og eingin annar enn Føroya fólk kann broyta hesa støðu.
- Um Danmark fer upp í gjaldoyrasamstarvið við ES, kunnu føroyingar sjálvir velja, um vit vilja varðveita donsku krónuna ella taka evruna í nýtslu.
- Føroyskur uttanríkispolitikkur fer ongantíð at verða stýrdur úr Brússel, men fer eisini framyvir at verða førdur í altjóða samstarvi. Danmark samstarvar longu við ES um uttanríkis- og trygdarpolitik, men hevur tikið fyrivarni ímóti felags verjupolitikkinum hjá ES. Um danir velja at ganga frá hesum fyrivarni ávirkar tað soleiðis bert tann felags verjupolitikkin.
- Samstarvið millum londini í Ríkisfelagsskapinum broytist ikki av at danir atkvøða fyri ES-stjórnarskipanarsáttmálanum ella velja at sleppa sínum fyrivarnum í limaskapinum í ES.

Sambandsflokkurin ætlar at halda seg til veruleikan í kjakinum um hvørja ávirkan tað fer at hava á Føroyar, um danir atkvøða fyri ES-stjórnarskipanini ella velja at ganga frá sínum fýra fyrivarnum í teirra limaskapi í ES.

Villeiðing og ræðumyndir tæna ongum.

# At gera tað ókenda kent

**Bjørg Joensen**
*Valevni Javnaðarfloksins*



VAL05

Avbjóðingin fyri føroysku umboðini á fólkatingi er at arbeiða fyri føroyskum áhugamálum og møguleikum, at kunna danir um føroysk viðurskifti, og at kunna føroyingar um arbeiðið á Christiansborg.

Flest øll starvsfólk ynskja at hava ávirkan á síni arbeiðsviðurskifti. Verða t.d. mannagongdir gjørdar, er tað skilagott at gera sína ávirkan galdandi, so úrslitið verður sum best. Hevur tú verið við til at gera mannagondirnar, kanst tú tryggja nøktandi karmar, og kenna tínar skyldur mótvegis arbeiðsgevaranum.

Soleiðis er eisini við arbeiðinum á fólkatingi.

Føroysku fólkatingsumboðini skulu gera sína ávirkan galdandi innan økir, ið hava ávirkan á føroyska samfelagið, so leingi sum núverandi skipan við føroyskum umboðum á fólkatingi er galdandi. Eftir mínum tykki eiga vit sostatt ikki at blanda okkum í donsk innanríkismál, men fylgja við í málum, ið hava ávirkan á føroyska samfelagið, og tryggja, at lógirnar ikki ganga ímóti føroyskum áhugamálum og ynskjum.

Úrslit skulu sjálvandi spyrjast burturúr arbeiðinum á fólkatingi. Men hvussu?

Tað verður ofta tosað um, at danir skulu virða okkara áhugamál. Tað er tó ómetaliga torført hjá tveimum pørtum at møtast, um bert annar parturin hevur virðing fyri hinum. Virðingin má ganga báðar vegir. Vantandi virðing er ofta grundað á vantandi vitan.

Skulu úrslit spyrjast burturúr fólkatingsarbeiðinum, er uppgávan at kunna um og skapa forstáilsi fyri báðum samfeløgunum.

At gera tað ókenda kent - í Danmark og í Føroyum.

# Aftur til politisku vinaløgini

**Rigmor Dam**
*valevni hjá Javnarðarflokkinum*



VAL05

Tað, sum vit í denn grad hava manglað seinastu árini, eru tey góðu gomlu politisku vinaløgini, millum føroyskar og danskar politikarar, við sínamillum forstáilsi og virðing.

Mongu konfrontatiónirnar, sum hava verið, eitt nú tá umboð fyri donsku stjórnina hava úttalað seg um skattalættan til fiskimenn og blokkstuðlinum, eru tekin um, at danskir politikarar ikki hava verið nóg væl upplýstir um føroysk viðurskifti. Ein hin fremsta uppgávan hjá fólkatingsumboðum okkara eigur at vera at upplýsa danir, bæði embætisveldið og politikarar, um føroysk viðurskifti, so slíkar óneyðugar misskiljingar ikki koma fyri.

Fólkatingsumboðini, sum hava umboðað okkum seinastu árini, hava ikki megnað at skapað fatan fyri føroyskum viðurskiftum. Ella hava ikki vilja arbeitt fyri at betra og menna samstarvið millum londini, men hava heldur vilja annaðhvørt tøgn og stilstøðu, ella konfrontatión, klandur og øsing. Samstarvið við danir hevur verið á einum formellum støði - og tá er sjálvsagt trupult at røkka semjum ella loysnum.

Neyðugt er við sakligum monnum og kvinnum at umboða føroysku tjóðina á Fólkatingi - fólk sum taka støðið í veruleikanum - og ikki stinga høvdið í sandin.

Tí, eitt kunnu vit skjótt blíva samd um: Heimastýrisskipanin er á nógvum økjum óhóskandi til dagsins samfelag, eitt nú, tá um ræður yvirtøkur og uttanríkispolitiskar heimildir, og fara næstu árini at seta stór krøv um úrslit og semjur millum danir og føroyingar á Christiansborg.